# Nøvn



## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, sonur, beiggi og svágur

**Heini Olsen**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Vit takka tykkum øllum, ið vóru við í leitingini, og ein serlig tøkk til Eiðis bygd og til Mortan, ið fann Heina. Tøkk til Studentaskúlan á Kambsdali.

Tøkk til Hanus á Gørðum og Kristian Hansen fyri góð og troystarrík orð í Christianskirkjuni. Tøkk fyri tónleik, sang og heilsanir í kirkjuni.

Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og vitjanir og tøkk fyri peningagávur.

Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Vegna tey avvarðandi***

***Nikolina, Rógvi, Høgni, Andrias, Jastrid, Julian, Wille og Anna***

## TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Emil Mikkelsen**
Klaksvík

andaðist og var jarðaður. Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, og tøkk fái tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Ein serstøk tøkk fyri alla hjálp við ervið og fyri gávur til dagtilhaldið Sóljuna.

***Familjunnar vegna***
***Nancy***

## Dagurin eitur Agapetus

18. august. Agapetus. Deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína. (Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)

Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum

### Prógv
Poul Niclasen, Klaksvík, hevur lokið prógv sum cand.mag í enskum, við hjágrein í bókmenta- og mentanarsøgu við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

### Gullbrúdleyp
Hósdagin 19. august kunnu Sigvør (ættað úr Klaksvík) og Poul Nielsen, Holtegårdsvej 5, DK-4780 Stege, Møn, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Silvurbrúdleyp
Mikudagin 8. september hava Alith og Hilmar Djurhus Strendur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. september kl. 18 í bygdarhúsinum á Strondum. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 24. august á tlf. 448534/224635.

### 90 ára føðingardagur
17. august fylti Jóhan Norðfoss, Tórshavn, 90 ár. Tey, ið ynskja heilsa uppá Jóhan, eru hjartaliga vælkomin í húsið hjá Starvsmannafelagnum 21. aug. frá kl. 12 til 16.

### 90 ára føðingardagur
Mikudagin 18. august verður Elsa av Reyni 90 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøtu 9. Tey, ið kundu hugsað sær at heilsa uppá Elsu, eru vælkomin millum kl. 16 og 20.

### 80 ára føðingardagur
16. august fylti Sonja Samuelsen í Søldarfirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Elim, leygardagin 21. august frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur
Sunnudagin 22. august verður Páll Jóanesarson Saltangará 70 ár. Dagurin verður hildin í hølinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag frá kl. 17. Øll eru vælkomin.

### 65 og 75 ára føðingardagur
Leygardagin 21. august halda Jensya Magnussen (Kastalag) 75 ára og Karin Kastalag 65 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Eldrafelagnum NÓN, Torvgøta 2 í Saltangará frá kl. 13 – 19.

### 60 og 70 ára føðingardagur
13. august fylti Sólbjørg Thomasen, Tórshavn, 60 ár og fríggjadagin 27. august fyllur Hilda Debes, Oyri, 70 ár, Systrarnar halda føðingardagin í Eydnuni á Oyrabakka leygardagin 28. august kl. 17 og úteftir. Tey, ið ynskja at heilsa uppá okkum verða vinarliga biðin um at siga frá innan 23. august á tlf. 313448/503448 (Sólbjørg) ella 422234/266334 (Hilda)

# Bilrøkt nýggja klárgeringarhøll

Opið hús verður leygardagin 21. august hjá Bilrøkt í Stiðjagøtu í sambandi við at fyritøkan fyllir fimm ár og ein nýggj klárgeringarhøll verður tikin í nýtslu.

Jákup á Borg, stjóri í Bilrøkt, sigur, at gólvvíddin í nýggju høllini er upp á tilsamans 260 fermetrar, og høllin skal nýtast til klárgering burturav. Vit hava gjørt hesa nýggju høllina, tí virksemið er vorðið so stórt og nú fáa vit samstundis meira pláss á mekanisku deildini.

Leygardagin hava vit fleiri góð tilboð eins og vit bjóða pylsur og okkurt leskiligt til børn og vaksin, sigur Jákup á Borg.



*Jákup á Borg, stjóri í Bilrøkt, framman fyri nýggju klárgeringarhøllina*